ÚTHEIMURIN

Politiskt skemt eystan jarntjaldið

NÝLIGA handaði sendimaður Kommunistakina eitt mótmælisskriv til bretska uttanríkisráðið móti einum bretskum vinstrasinnaðum blað, sum hevði prentað eina skemtigrein »Niður við fr/ðarmanninum« undirskrivað Chou En-Lai. Í greinini kundi ei lesa um politisku stoðu Kina, sum um rithovundin »veruliga« var Chou En-Lai, forsætisráðharra. Hetta mótmælisskrivið varð rættuliga gjørt til gjoldur í bretsku blóðunum, tí kinesarar høvdu misskilt skemtið og tikið alt í fullum álvara.

KINESISKA SMILIÐ RØKKUR IKKI AT HJARTANUM

Kinesiskt skemt er ymiskt frá europeiskum skemti. Skemtisøgur, ið nú ganga munn av munni í gøtuum í Moskva um politisku leiðarnar í Sovjet, eru meira vanligar enn tær skemtusøgur, ið sagdar vera aftan fyri bambusteppið í Kina. — Undir Mao røkkur tað »kinesiska smiliðe ikki longur at hjartanum, tað hongur á varrunum og fanar burtur.

Annarleiðis er í Sovjet og teimum eysteuropeisku londunum, har aktuellar skemtisøgur siga frá úrslitinum av dagsins politikki, styrti og greiðari enn langar blaðgreinir.

Í Eystureuropu ferðast nú ein søga um ein kommunistiskan fyrilestramann, sum í vælvaldum orðum sigur frá teimum óvanligu »sosialistisku« framstigunum. Ein áhoyrari spyr hann: »Kammerat, fánnast eingir trupulleikar í okkara samfelag, sum ikki kunnu greiðast?« Fyrilestramaðurin hyggur strangliga at hinum spyrjandi og svarar:

»Um tað er landbúnaðin, tygum sipa til, nokk eg at svara.«

ADAM OG EVA VÓRU SJÁVANDI RUSSISK

Í Moskva bera tey upp hesa gátuna: Hvørjir landsmenn vóru Adam og Eva? Svarið ljóðar: russisk sjálvandi. Tey vóru nakin, áttu einki og lívdu í Paradisinum.

Russisku påstandirnir um, at alt, ið uppfunnið er, frá fyrstu hond er uppfunnið av russum, hava verið orsøk til eina ógviliga væl umtókta søgu um ein mann, sum vitjar aftur til heimbygd sína eftir at hava verið burturstaddur í mong ár. Ein dagin, hann spákar eftir gøtuni, rakar hann við eina ógviliga stóra standmynd og spyr vinmann sin: »Hvør er hasin?« »Hatta er Petrov, sum uppfann elektriska ljósið, flogfarið, seymimaskinuna og dampmaskinuna,« svarar vinmaðurin. Eina løtu seinri koma teir fram við eina tríggjar ferðir so stóra standmynd.

»Hvør er hasin?« spyr maðurin. »Nú, hatta,« svarar vinmaðurin, »hatta er Ivanov, sum uppfann Petrov.«

REVSINGARTIÐIN VERÐUR BARA SO MIKIÐ LONGRI

Ein serligum formur fyri aktuellum skemtisøgum er »Radio Yerevan«, eisini er væl umtókt í øðrum kommunistalondum. Yerevan er høvuðsstaður í Sovjet-Armeniu, hvørs ibúgvar eru kendir fyri teirra vanvirðing av myndugleikum. — »Radio Yerevan« er eitt spursmál-og-svar program, sum ger grin burtur úr myndugleikunum.

»Tá ið vit hava fingið kommunismuna í heilum lagi, fara vit so at hava pengar?« Svar: »Dogmatikararnir siga nei, Revosionistarnir siga ja. Realistarnir siga, at hvørki av hesum er rætt, men at nøkur menniskju fara at hava peningar og onnur ikki.«

Sovjettisku medisinsku framstigini hava sínar søgur. Ein av teimum sigur frá tveimum fangum í Sibiriu, sum tosa um tey seinastu medisinsku framstigini, ið verða at leingja livialdurin hjá fólki munandi. Teir koma til hetta úrslit: »So verður straffitiðin uppaftur longri.«

»Tað hevur verið frammi, at herleiðararnir í Sovjetherinum skulu ganga í seyðaskinnshúgvum. Er tað rætt?« Svar: »Tað er lítið trúligt, tí framleiðslan av herleiðarum er nógv størri enn framleiðslan av seyði.«

KANN KAPITALISMAN VERÐA TIL KOMMUNISMU?

Tað ganga eisini søgur um kosmonautarnar. Um Titov verður sagt, at hann var ikki væl nøgdur við stýrigreiðurnar hjá sær: »Seytjan ferðir kring knøttin — og onga staðni at kunna lenda uttan í Sovjetsamveldinum.«

Spurningar og svar millum lærarar og næmingar heyrir ein um í hópatali ... T. d. spyr ein lærari klassan: »Kan kapitalisman nakran tíð verða til kommunismu á friðarligan hátt.« Allir næmingarnir: »Kanska, men hvør ynskir at gera tað?«

Aftaná Wienerfundin millum Khruschev og Kennedy kom hendan søgan fram: Meðan teir talaðu saman, sammettu teir urini hjá hvørjum øðrum. Á urinum hjá Kennedy stóð at lesa: »Til USA's vakrasta forseta frá amerikansku kvinnum.« Khruschev opnaði sítt og las: »Til kæru dóttur mína, Anastasiu frá sær Nikolaj.«

Í Bulgari las ein bóndi eitt gotuuppslag, ið boðaði frá, at haldast skuldi ein mánaði til fruma fyri bulgarsk-sovjettiska vinarlagið. »All rigth,« bruman aði bóndin, »ein mánað, heldur ikki ein tima longur.«

SANKTA PÆTUR: KOM INN, GOMULKA!

Folakkar, stuttleika sær eisini av teirra leiðarum, serstakliga Gomulka, forsætisráðharra. Ið teir halda hevur heldur lítið til. Ein av søgunum sigur frá St. Pætur og trimum monnum, ið bíða eftir at sleppa inn.

»Hvør er tú?« spyr St. Pætur hin fyrsta mannin. »Eg eri Arthur Rubenstein,« verður svarað. Men áður hann sleppur inn má hann spæla uppá klaver fyri at prógva, at hann er maðurin, hann sigur seg vera. St. Pætur biður hann fara inn. Næsti maður er Pablo Picasso. Hann prógvar, hvør hann veruliga er, við at gera nakrar tekningar, og so sleppur hann inn. Triði maðurin er Wladyslaw Gomulka. St. Pætur biður hann prógva, hvør hann er.

»Hvussu?« spyr Gomulka.

»Rubenstein og Picasso vóru her í áðni. Teir prógvaðu tað.«

»Hvørjir eru teir?« spyr Gomulka.

»Kom inn,« sigur St. Pætur.

»NIÐUR VIÐ KHUSCHEV! TVEITIÐ HANN ÚT!

Ein onnur søga verður søgd í Warsawa um ta ferðina, tá ið Gomulka og pólski forsetin Cyrankiewicz vóru í Moskva til hina næstseinastu kommunistakongressina har — hina tíltiknu 22. kongressina, tá Khruschev gjørdi upp við Stalin. Gomulka og Cyrankiewicz svóvu í sama rúmi í gistingarhúsinum. Um náttina fer Gomulka at rópa: »Niður við Khruschev! Tveitið hann út!« Onur av ræðslu vaknar Cyrankiewicz og spyr, hvat honum baggar og minnir hann á, at hann er í Moskva.

»Á, sigur Gomulka, meg droymdi, at eg var til hina 24. flokkskongressina.«

Pokurnar í Stockholm

Herfyri søgdu tíðindi frá, at pokurnar gingu í Svøriki. Ein sjómaður hevði borið smittuna við sær. Ein kona doyði í seinastu viku og higartil eru 10 vorðin sjúk av pokum.

Svenski høvuðsstaðurin er í løtuni roknaður fyri smituberandi umráði, og myndugleikarnir fyrireika nú eina møgulga koppseting av øllum íbúgvarunum.

Skattalógin er samtykt

At kalla eitt sameint ting hevur nú samtykt nýggju skattalógina. — Nakrar broytingar eru gjørdar, men lógin er í sínum heild at kalla hin sama, sum skattanevndin hevði eva að tíl í fjor.

Tað er ognaruppgerðin, sum er høvuðsbroytingin frá teirri gomlu lógini, og hetta væntа menn skal verða skattamyndugleikunum til góða og neyðuga hjálp.

PÁRTAFELAGIÐ

SJÓVINNUBANKIN

HØVUÐSSKRIVSTOVA — TÓRSHAVN

Telefon 1150 — Telex 29

TELEXSAMBAND VIÐ ALLAN HEIMIN

Setið peningin inn, so verður hann í landinum og egna vinnulívi okkara á sjógvi sum á landi at gagni.

Innlánsrentan er:

Við 3 mánaða uppsøgn	4 % p. a.
Á vanligari bankabók	3½ % p. a.
Á tjekk-konto	2 % p. a.

Tosið við okkum, tá tygum hava fíggjarspurningar at greiða, eitt nú viðvíkjandi skipa- ella húsabygging.

Deildir:

Norðuroyar:	Norðoya Banki	Klakksvík	tlf. 5296
Eysturoy:	Runavíkar avgreiðsla		tlf. 7017
Vágar:	Sjóvinnubankin,	Sørvági	tlf. 19
	—	Sandavági	tlf. 101
	—	Miðvági	tlf. 30
Sandoy:	—	Sandi	tlf. 42
Suðuroy:	—	Hvalba	tlf. 48

Alt bankayrki her á landi og við útheimin verður útint

Bankin er opin hvønn gerandisdag kl. 10—12 og 14—16
Leygardag kl. 9.30—12 30

Hin føroyski bankin

Út er komin 2. útgáva:

Føroya siglingarsøga I

Ár 1000 — 1856

BÓKIN KOSTAR 30 KR. OG FÆST HJÁ UNDIRRITAÐA OG Í BÓKAHANDLUM.

Páll J. Nolsøe,
Landavegur 18.

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN af 1959.

9. trækning (grønne obligationer). Lånet omfatter serienumrene 3001—4000 og løbenumrene 3001—5000 incl.

Følgende større præmier er i dag udtrukket:

Præmiernes størrelse er angivet med bogstaver ud for det udtrukne serie- og løbenummer, således at **A** betyder præmie på 250.000 kr., **B** 100.000 kr., **C** 50.000 kr., **D** 25.000 kr., **E** 10.000 kr., **F** 5.000 kr.

serie nr.	løbe nr.		serie nr.	løbe nr.		serie nr.	løbe nr.		serie nr.	løbe nr.		serie nr.	løbe nr.		serie nr.	løbe nr.	
3035	4633	F	3197	4357	F	3351	4076	F	3459	3483	F	3677	3584	E	3864	3225	F
3037	3933	F	3209	3153	F	3352	3206	D	3537	3965	E	3693	3524	A	3873	4027	F
3045	3686	E	3233	3266	D	3360	3423	F	3560	4387	E	3733	3729	C	3876	4273	F
3047	4709	E	3239	3958	F	3372	4712	E	3563	3340	E	3744	4187	B	3876	4507	C
3091	3613	E	3271	4596	B	3387	4470	F	3614	3630	F	3756	3103	E	3901	4405	F
3092	3082	F	3271	4870	F	3403	3600	F	3617	3969	F	3762	4260	F	3902	4421	E
3125	3283	E	3274	4000	F	3406	3497	E	3625	4441	D	3771	4672	F	3952	4276	F
3131	4795	C	3295	4896	E	3409	3089	F	3636	3555	F	3786	4794	D	3955	4309	F
3149	3983	E	3298	4688	F	3425	3318	E	3647	3105	F	3804	4629	E	3956	4541	D
3161	3947	D	3347	4551	E	3444	4740	E	3664	4236	F	3828	3219	F	3960	4269	F
3185	3647	D	3348	4569	E	3450	3238	D	3666	4479	D	3842	3771	E	3981	3738	D

Den officielle trækningsliste indeholdende samtlige 1266 udtrukne numre samt restancer fra tidligere trækninger vil kunne købes for 25 øre i bladudsalgene fra den 14. maj d. å. **Udbetaling af præmier af alle størrelser foregår ved finanshovedkassen, amtstuer** og endvidere uden for København ved **toldkasser fra og med den 15. maj d. å.** Af kontrolhensyn vil der for obligationer, på hvilke der er faldet præmier på 500 kr. eller større beløb, og som er indleveret til amtstuer og toldkasser, hengå nogle dage mellem obligationernes indlevering og præmiernes udbetaling. Præmier, der er faldet i denne trækning, skal være hævet senest den 15. maj 1966.

Finansministeriet, den 2. maj 1963.